# Fegnast um at Johan Dahl fekk álitisváttan

**– Formansvalið í sambandsflokkinum var ikki eitt misálit á Johan Dahl, men ein álitisváttan. Men tað, sum er hent síðani, vísir, at vit valdu rætt, sigur formaðurin í Norðoya Sambandsfelag**

SAMBANDS-FLOKKURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hóast Johan Dahl ikki varð valdur til nýggjan formann í sambandsflokkinum, var ikki ein misálitisváttan. Tvørturímóti fekk hann eina álitisváttan frá sambandsfólki.

Tað heldur John William Joensen, formaður í Norðoya Sambandsfelag.

Johan Dahl fekk 40% av atkvøðunum og tað heldur hann avgjørt ikki var eitt misálit, men ein álitisváttan, tá ið hugsað verður um, at tað eru bara tvey ár síðani, at hann varð koyrdur frá sum landsstýrismaður.

– Eg var ógvuliga fegin um, at formansvalið var so javnt, sum tað var, tí tað vísir, at Johan Dahl hevur stórt álit hjá sambandsfólki.



*– Vit ivast í um tað er rætt, at sambandsfólk høvdu tryggjað Johan Dahl so stóra undirtøku á formansvalinum, at hann skuld vinna á Kaj Leo Johannesen, tí longu frammanundan valinum høvdu vit eina greiða fatan av, hvønn veg tað fór ganga, sigur John William Joensen, formaður í Norðoya Sambandsfelag*

Og tað skilja vit væl, tí okkum hevur dámað hann væl sum politikara.

Av tí sama heldur John William Joensen ikki, at tað var rætt av Johan Dahl, at melda seg úr flokkinum fyri tað um hann tapti.

– Tað er er rætt at bjóða seg fram sum formann ta einu løtuna, men at melda seg úr flokkinum, tá ið valið ikki gongur heilt eftir vild.

– Ein atkvøða fyri øðrum valevninum, er ikki ein atkvøða ímóti hinum valevninum, leggur formaðurin í Norðoya Sambandsfelag afturat.

Hann vísir eisini á, at hóast valið varð javnt, er tað ikki ein sambandsflokkur í tvíningum, sum nú gongur framtíðini ímóti.

Flokkurin stendur og fellur ikki við einum manni, sigur John William Joensen.

### Var ikki við

Annars slær John William Joensen rimmar fast, at Norðoya Sambandsfelag var ikki við til at stilla Johan Dahl upp sum nýggjan formann í Sambandsflokkinum.

Hann visir sostatt fráboðani aftur um, at Norðoya Sambandsfelag var eitt av teimum økisfeløgunum hjá sambandsflokkinum, sum var við til at stilla Johan Dahl upp ímóti Kaj Leo Johannesen.

Kortini váttar hann, at tað var ein nevndarlimur í Norðoya Sambandsfelag, sum var við til at stilla Johan Dahl upp.

– Men tað gjørdi hann bara fyri seg sjálvan og sostatt ikki fyri nevndina, ella felagið, sum heild.

John William Joensen vísir eisini á, at tað var hvørki Norðoya Sambandsfelag, ella tann einstaki nevndarlimurin, sum heitti á Johan Dahl um at stilla upp.

– Orsøkin til at hesin eini nevndarlimurin skrivaði undir upp á at stilla Johan Dahl upp, var tí at hann var spurdur um hann vildi gera tað og hesi áheitan fylgdi hann.

Men ein tilsøgn um at lata Johan Dahl stilla upp, er ikki tað sama sum ein tilsøgn um at velja hann.

– Hann helt sum so, at ætlaði Johan Dahl at stilla upp, átti hann at fáa loyvi til tað og sostatt skrivaði hann undir, tá ið ein áheitan kom um tað.

### Vildu ikki velja frammanundan

Annars viðgjørdi Norðoya Sambandsfelag spurningin.

– Men vit gjørdu púra greitt, at vit fóru ikki at boðað frá frammanundan, um vit stuðlaðu Johan Dahl ella Kaj Leo Johannesen, sigur formaðurin.

JohnWilliam Joensen sigur, at felagið vildi ikki taka støðu fyri øðrum valevninum, tí at felagið vil hava gott samstarv allar vegir.

– Men tað, sum síðani er farið fram síðandi formansvalið, hevur sannført okkum um, at Norðoya Sambandsfelag valdi rætt! Hann vísir eisini á, at av allari tingmanningini hjá Sambandsflokkinum, var tað bara ein, sum atkvøddi fyri Johan Dahl.

– Og tað vildi verið óheppið, at havt ein formann, sum ikki hevði undirtøku í tingmanningini, sigur formaðurin í Norðoya Sambandsfelag.

Somuleiðis ivast John William Joensen í, at Johan Dahl frammanundan hevði trygggjað sær so stóra undirtøku, at hann fór at vinna á Kaj Leo Johannesen.

– Eg kann bara siga, at longu frammanundan valinum høvdu vit í Norðoya Sambandsfelag eina greiða fatan av, hvønn veg úrslitið fór at ganga og tað gekk, sum vit mettu, sigur hann.

# Eisini onkur suðuroyingur vendi tummulin niðureftir

**Johan Dahl hevði ikki fulla undirtøku í sínum egna valdømi, tá ið hann stillaði upp til formansvalið í Sambandsflokkinum. Eg atkvøddi fyri Kaj Leo, váttar næstformaðurin í Suðuroyar Sambandsfelag**

SAMBANDS-FLOKKURIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg lovaði ongantíð at atkvøða fyri Johan Dahl sum nýggjum formanni í sambandsflokkinum.

Tað váttar Marjun Olsen á Tvøroyri.

Hon er næstformaður í Suðuroyar Sambandsfelag. Og hon váttar samstundis, at hon atkvøddi heldur ikki fyri Johan Dahl, men fyri Kaj Leo Johannesen.

Sostatt váttar hon, at táið Johan Dahl stillaði upp til formansvalið í Sambandsflokkinum, hevði hann heldur ikki allar suðuroyingarnar aftanfyri seg.



*Marjun Olsen er næstformaður í Suðuroyar Sambandsfelag og hon vil ikki vera kallaður svíkjari. Hon sigur, at hon hevur ongantíð lovað at atkvøða fyri Johan Dahl og tað vistu øll av frammanundan. Her er hon saman við Jaspuri Vang, sum var varmaður hjá Johan Dahl, teir dagarnar, hann sat í landsstýrinum*

Marjun Olsen sigur, at nevndin í Suðuroyar Sambandsfelag visti alla tíðina av, at hon stuðlaði ikki Johan Dahl.

– Tað gjørdi eg púra greitt frammanundan, so tað vistu øll av, leggur hon afturat.

Hon sigur, at hon tvíhelt um, at hon hevði rætt at atkvøða eftir bestu sannføring.

– Tað einasta, eg boygdi meg fyri, var, at Suðuroyar Sambandsfelag skeyt Johan Dahl upp sum formann. Eg boygdi meg fyri meirilutanum og skrivaði undir, at Suðuroyar Sambandsfelag stillaði hann upp, men eg lovaði ongantíð at atkvøða fyri Johan Dahl.

– Eg helt, at vildi Johan Dahl royna seg sum formansvalevni, haldi eg, at hann skal fáa loyvi til tað, tí tað er ein ærlig sak. Men tað merkir ikki, at eg lovaði honum mína atkvøðu.

### Hugsaði um flokkin

Marjun Olsen sigur, at tá ið hon atkvøddi um, hvør skuldi vera formaður, gjørdi hon, sum hon helt var best fyri flokkin.

– Eg hugsaði eisini um støðuna, ið flokkurin kom í, tá ið Johan Dahl var landsstýrismaður, tí tað støðu vil eg ikki, at flokkurin skal koma í aftur.

Nú bleiv ongin sak burturúr teimum skuldsetingum, sum tá vórðu førdar fram. Merkir tað ikki, at Johan Dahl er reinsaður fyri skuldsetingarnar og er tað rímiligt, at tað kemur honum aftur um brekkur nú, at hann fær skuldsetingar omanyvir seg, sum síðani onki hendir við?

– Tað eigur tað helst ikki. Men tað er ikki altíð ein spurningur um, hvat hald er í slíkum skuldsetingunum. Bara tað, at skuldsetingar verða settar fram, skapar órógv og tað noyðast vit at hugsa um, antin tað so er rímiligt ella ikki.

Av tí sama heldur Marjun Olsen ikki, at Johan Dahl hevur tað neyðugu savnandi kraftina, sum krevur av einum formanni.

Annars eru tað fleiri, sum seta spurnartekin við, um Suðuroyar Sambandsfelag hevur gjørt sítt heimaarbeiði til lítar.

Tað hevur verið ført fram at tað vóru Suðuroyar Sambandsfelag, sum stillaði Johan Dahl upp, saman við feløgunum í Norðoyggjum, Eysturoy og í Norðstreymoy.

– Tað er ikki rætt, sigur Marjun Olsen.

– Tað vóru ikki fýra feløg, sum stillaði Johan Dahl upp men tvey feløg og so so tveir einstaklingar afturat. Veruleikin er, at tað vóru Suðuroyar Sambandsfelag og Norðstreymoyar Sambandsfelag, sum stillaði Johan Dahl upp, saman við einum limi úr Eysturoyar Sambandsfelag og einum limi úr Norðoya Sambandsfelag. Tað vóru sostatt ikki Eysturoyar og Norðoya Sambandsfelag, ið stóðu aftanfyri Johan Dahl sum feløg, sigur Marjun Olsen.

Tí ivast hon eisini í um tað er rætt, at Johan Dahl hevur tryggjað sær so stóra undirtøku, sum sagt verður.

### Læt atkvøðuna frá sær

Umframt at verða næstformaður í Suðuroyar Sambandsfelag, er Marjun Olsen eisini limur í starvsnevndini hjá Sambandsflokkinum.

Og tá ið atkvøðast skuldi um formannin, læt hon atkvøðuna sum næstformaður í Suðuroyar Sambandsfelag frá sær og atkvøddi einans sum limur í starvsnevndini.

Hon ásannar, at hetta kann merkja flokkin á næsta vali, men hon ivast í tí.

- Sambandsflokkurin stendur og fellur ikki við einum einstaklingi, leggur hon afturat.